Løgtingslóg
um
broyting í løgtingslóg um serligt avgjald á brenniolju
(Skattaumskipan 2024 og 2025, hækking av brennioljugjaldinum)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 179 frá 18. desember 1992 um serligt avgjald á brenniolju, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 141 frá 18. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Í 2024 verður eitt gjald upp á 0,80 kr. pr. ltr. lagt á søluna av gassolju, viskositet við 38 stig C undir 200 sec. Redwood I, til brúkaran. Vøran er nevnd í skjali 1, Toll- og vøruskráin, í løgtingslóg um toll undir vørunumrum 27101947 og 27101948 fýringsolja, 27101943 og 27101946 autodieselolja. Í 2025 og árini frameftir er gjaldið 1,00 kr. pr. ltr. Í 2024 verður somuleiðis eitt gjald upp á 0,90 kr. pr. ltr. lagt á søluna til brúkaran av brenniolju, fuelolju. Vøran er nevnd í skjali 1, Toll- og vøruskráin, í løgtingslóg um toll undir vørunumrum 27101964 og 27101968 brenniolja. Í 2025 og árini frameftir er gjaldið 1,15 kr. pr. ltr."

2. § 2, stk. 4 verður strikað, og í stk. 5, sum verður stk. 4, verður ", hvørji virki koma undir stk. 4 og um" strikað. Stk. 5 verður eftir hetta stk. 4.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 15. desember 2023 við 18-0-15 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 19. desember 2023

stjóri

LM-039/2023